gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Kollvelting – ella kollrenning?

Í dag fara vit allarhelst undir eitt nýtt tíðarskeið í Føroya søgu. Eftir tí, sum er komið fram, fer fyrsta oljusamtakið at royndarbora eftir olju. Gongur eftir ætlan fáa vit um nakrar mánaðir at vita, um olja er í føroysku undirgrundini. At tað er olja, ivast oljuserfrøðingar ikki í. Spurningurin er meiri, um hon er í størri nøgdum, og um tað loysir seg at fáa hana upp.

Verður rakt við olju í stórum nøgdum er tað einki annað enn ein kollvelting, sum ein tann fremsti talsmaðurin í føroyskum oljuhøpi, Johan Mortensen, umboðsmaðurin hjá oljufelagnum Anadarko, segði í samrøðu við Fregnir fríggjadagin. Ein komandi oljuvinna kann broyta føroyska samfelagið so nógv, at tað er ein kollvelting í sjálvum sær. Men ein kollvelting kann bæði hava hepnar og skaðiligar avleiðingar. Hon kann eisini kollrenna land og fólk.

Møguliga sær Johan Mortensen í so nógv tær hepnu avleiðingar. Men, sum hann sigur, er ein komandi oljuvinna ein ómetalig stór avbjóðing fyri føroyingar og Føroyar – ikki minst fyri føroyskar myndugleikar. Higartil hava føroyskir myndugleikar staðið seg væl. Onkur sigur í so væl, tí oljufeløgini hava róst teimum so nógv. Men tað er at fegnast um, at vit hava eitt professionelt aðalstýri.

Venda vit aftur til avbjóðingarnar, sammetir umboðsmaðurin hjá Anadarko eina oljuvinnu við hendingar sum tá Rybergshandil virkaði í Føroyum og tá vit fingu fríhandil. Spurningurin er, um her er nakað sammetingargrundarlag. Avbjóðingin er nógv størri, og avleiðingarnar kunn verða nógv álvarsamari – báðar vegir, um stýringin ikki er góð.

Taka vit avleiðingarnar sum eina avbjóðing, hava hvørki fjølmiðlar, myndugleikar ella meiningssmiðir viðgjørt avleiðingar nóg væl. Eitt nú avleiðingarnar fyri húsaprísir, prísin at leiga, og tað árin, sum ein komandi oljuvinna hevur á samfelagið og lokalsamfelagið. Hesin tátturin er ikk nógv væl fyrireikaður afturímóti føroyskari vinnu, sum er væl fyrireikað. Ikki bara lokalt, tí hon hevur sanniliga lagt á tann bógvin, at eisini kann og virkar uttanlands. Takkað verið m.a. Menningarstovuni.

Er olja, mugu vit av álvara fyrireika okkum til broytingar høvuðsvinnuni og aðrari vinnu við, tí í kappingini um løntakararnar vinnur tann væl rindandi oljuvinnan helst. Men enn er tíð til slíka umhugsan. Mangan er kastað Sosialinum fyri, at olja er so nógv umrødd í blaðnum, men vit hava verið sannførd um, at hetta hevur verið eitt stórt og spennandi mál – ja, sum kann gerast ein kollvelting – og vit fara framhaldandi at fylgja við og veita lesarum okkara holl og alítandi tíðindi um hetta evnið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lítil viðmerking til Harry Benjaminsen

**Eyðbjørn Jakobsen**
*Havn, tann 5. juli 2001*



Vit báir hava helst mangt annað at takast við enn at fara undir at tveita runubløk eftir hvørjum øðrum, men tá tú skírir grein mína orðaskvaldur, ósakliga og beinleiðis ósanna, dugi eg ikki rættiliga at fylgja tær; Vígdis og Ingeborg duga helst at svara fyri seg um tær hava hug til tess. Har skal eg ikki leggja nakað afturat í løtuni.

Grein mín var skrivað sum eitt slags aftursvar til sjenskt uppsettu greinina á forsíðu Sosialsins, og sum sambært sama var íblást av Ingeborg og Vígdis.

At tjakast um formenn og nevndarlimir og hvør skal, má, ikki skal osfr. úttala seg vegna felagið fari eg at lata liggja. Við ta, at limirnir velja nevnd og formann, hevur eitthvørt felag júst tað nevnd og tann formann tað hevur uppiborið!

Um samráðingarupplegg okkara veit tú "frá álítandi keldu" at einki var niðurskrivað! Býttislig illgiting, heldur tú ikki tað sjálvur? Ella vánalig kelda.

Hetta er helst sama "álítandi" kelda sum beinleiðis av fundi hjá FA og HAK í Kollafirði (meðan verkfallið var) visti at siga frá, at tá ið Klaksvíkingar og Havnarmenn hevði skrivað undir sáttmálan, fekk Carl tvær vínfløskur (um tað var frá arbeiðsgevarum ella semingsstovni, var ikki heilt greitt) og nevndin (- um Klaksvíkingar vóru við ella ikki, visti "keldan" heldur ikki rættiliga) fór tá at ballast á Hafnia saman við semingsmonnunum.

At enda: er tað veruliga so, at FA ynskir lønarmun? Í slíkum førum verða tað altíð - tað hevur víst seg aðrastaðni og fer eisini at vísa seg her - feløgini í høvuðstaðar- og miðstaðarøkjunum sum fáa mest burturúr meðan útjaðaraøkini verða við skerdan lut.

Yvir og farin - hav eitt gott summar.

Skatturin hjá fiskimonnum:

# Manipulatión hjá Kára Petersen

**Óli Jacobsen**



Búskaparfrøðingurin Kári Petersen er rættuliga farin í herna móti almennum skipanum hjá fiskimonnum. Hetta hevur hann sjálvsagt fullan rætt til. Sjálvur havi eg ikki ætlað at fara út í almennan orðadrátt, men heilt upplagdar manipulatiónir skal hann ikki sleppa við, sum t.d. tá hann skrivar í bløðunum leygardagin:

*Óli Jacobsen umber í mikudagsbløðunum (undanfarna) landsstýrið við, at tað bert gjørdi skattalættaskipanir (tað er reiðarastudningsskipanir), sum líkjast teimum sum eru í okkara grannalondum.*

Veruleikin er hesin: Kári helt seg hava funnið eina rættuliga undirbygging í síni søk við pástandinum um, at fiskimannaskatturin í veruleikanum er talan um kamufleraðan reiðarastudning.

Um hetta segði hann í bløðunum fyrr í undanfarnu viku:

*Skattalættin verður á pappírinum givin til fiskimenn, men tá skattalættin var framdur fyri fýra árum síðani var grundgevingin ein heilt onnur...nevniliga at fiskimenn fingu meira í hýru aðrastaðni, og av tí at føroyskir reiðarar vóru so illa fyri, og ikki høvdu ráð til at geva fiskimonnum meira hýru, so varð neyðugt at geva fiskimonnum ein skattalætta, so føroyskir reiðarar kundu sleppa bíligari. Sostatt er skattalættin til fiskimenn einki annað enn ein studningur frá landskassanum til føroyskar reiðarar.*

**Grundgevingin fríur fantasiur.**
Um hetta veruliga var so, hevði Kári eisini gott at halda um. Men í greinini mikudagin kundi dokumenterast, at tað sum Kári leggur táverandi landsstýri í munnin er reinur fantasiur. Umrødda grundgeving hevur ikki verið tikin uppá tungu. Tískil er trumfurin hjá Kára einki uttan fupp!

At prógva hetta var endamálið við umrøddu grein. Og hetta varð gjørt við at endurprenta tær grundgevingar, sum landsstýrið veruliga hevði nýtt í málinum, og her var einki samsvar millum tað, sum Kári sigur hava verið grundgevingina hjá landsstýrinum.

Afturat hesum kann staðfestast, at føroyskir reiðarar rinda ikki minni part í hýru enn t.d. íslendskir og norskir. Er tað nakað er tað beint øvugt. Tí kann henda grundgevingin ikki nýtast.

**Miðvís manipulatión.**
Tað sum Kári ger nú er at snara hesa greiðu staðfesting til, at eg við míni grein skal hava funnið eina "umbering" fyri landsstýrið í hesum máli. Og so turar hann fram við sínum teoriium um reiðarastudning, sum um einki er hent.

Hetta er ein grov manipulatión, og tað ber til at grundgeva eitthvørt sjónarmið við hesi metodu.

Nú passar tað Kára bert at nýta Ísland til samanberingar. Og hann hevur allar møguligar undanførslur fyri ikki at nýta Noreg, sum hevur eina skipan á økinum, sum er mestsum meinlík okkara.

Lesarin skal í hvussu er kenna hansara arbeiðshátt, sum er at byrja við niðurstøðuni og síðan at pilka enntá óveruligar grundgevingar fram úr rúgvuni, sum hóska við niðurstøðuni.

Og staðfest er, at royndin at nýta tær grundgevingar, sum vóru brúktar av landsstýrinum í 1997 fyri skattaskipanini eru fupp.

Tað sum sagt hetta sum málið snýr seg um.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Vilja ikki hava fleiri brekað í grannalagið

**Helena Fríðheim**



So hendi tað aftur – at vælbjargað fólk, hesaferð í Smærugøtu, ikki vilja verða grannar til evnaveik fólk. Hetta tykist mær vera ein óheppin gongd her hjá okkum, tí hvørji verða krøvini nærstu ferð? Hetta hildu vit fyri fáum árum síðani bert kundi koma fyri í útlondum. Alt er allastaðni, jú vit kunnu saktans samanberast við útheimin. Vit hoyra dagliga í fjølmiðlunum um, hvussu ørðvísi fólk verða viðfarin.

Hesin bólkur, sum er eksistensielt raktur, tað vil siga, at teirra fría val er skert, kann ikki velja síni hús ella íbúð sjálvi – og enn minni teirra grannar. Tey seta harafturímóti slettis ongar treytir til grannarnar.

Hesi evnaveiku fólkini og familjur teirra hava verið ígjøgnum eina drúgva process av sorg og ótilstrekkiligheit á ymiskan hátt, so eg meini als ikki, at tað er rætt, at tey fáa hesa viðferð. Tað eru ikki hesi fólkini, sum gera verðina ljóta, um tey fáa tað umsorgan, tey hava fyri neyðini.

Fólk hava ymiskan førleika. Tað letur til, at tey vælbjargaðu fólkini, sum búgva í Smærugøtu, hava ein almennan samfelagsligan veikleika. Hesin bólkur er ein av teimum nýggju sjónligu bólkunum her hjá okkum, sum tyngja arbeiðið við at gera forsorgartørvin meira menniskjasligan.

Um ikki verður tikið hond um hetta kjakið á ein skynsaman hátt, kann hetta koma at hava eina óheppna ávirkan á hugburðin viðvíkjandi evnaveikum langt fram í tíðina.

Tað er bert at vóna, at fólkini í Smærugøtu, sum her handla í óvitinheit, verða upplýst um málið á rættan hátt, soleiðis at tey, tey evnaveiku fólkini, familjur teirra, starvsfólk og avvarðandi myndugleiki koma fram til eina virðiliga niðurstøðu.

# Teistatáttur

Í nýtjanhundrað og nítiní
Tann øldin í gott var at liva
Um Sandoyarferju byrjaði stríð
Tó sáttmála mundu teir skrivað
at byggja í Føroyum bar ikki til
Men vit royna Polen har er betur skil

Niðurlag:
Alt í Sandoynni vakurt er og gott
Kemur ikki við í hendan tátt

Í tveytúsund kjølurin strektur bleiv
í Polen á skipaskiðju
Men har sást alt ganga eftir reyv
Tað leið ikki um eina fliðu
Polakkarnir fingu ei liðugt tað far
Seks mánaðir skrokkurin seinkaður varð

Tá skrokkurin togaður bleiv her heim
tá barst tað soleiðis íbandi
At veðrið ei bleiv til gleði og gleim
Men lagt bleiv í Danmark at landi
Av onkrum bleiv hetta her soleiðis týtt
At Nyrup slapp fram gandakynstur sítt

Men loysið tit landsins kosnu menn
Sum skip byggja í øðrum londum
Tit vita her heima finnast nú enn
skipsbyggjarar á Føroyastrondum
í Føroyum fekk Teistin so mangan ein klikk
Og tíðin hon helt við ein punkt og prikk

Nú tíðin hon gongur og liðugt bleiv far
og alt eftir vild seg lagar
tá strandferðslan bjóðar nógv fólk hjá sær
Teir ballast í fleiri dagar
Av sonnum alt hetta her gekk so væl
Um Skopunarfjørðin nú siglast skal

Av Tjaldrinum hoyrdist tá øðiligt róp
Og tað var hann Ellintur stóri
Tit halda tit ganga her og sláa kóp
Hann brølar sum kálvur í flóri
Sín stóra neva í borði slær
Alt mítt skal á pláss tað sigi eg tær

Men Karsten hann svarar við lív og sál
Hann vil ei av Ellinti lærast
Tú veit væl eg umsiti fíggjarmál
Og her skal hvør króna sparast
Tú kann saktans verða so tvørur tú vil
Og Teistin bleiv lagdur det er eitt skil

Í tríggjar mánaðir lá Teistin við kai
Og samráðst bleiv í Tinganesi
Øll uppskot tey blivu svarað við nei
og so bleiv runnið á v.c.
Og so gekk tíðin við klandur og stríð
Dett er ein verð vit liva í

Á Reynatúgvu í bønum hjá sær
so øgiligt Páll mann renna
Hann gongur og jagstrar har eina ær
Tá froysur hann út úr at flenna
Hann ærina fekk við eitt øgiligt knoss
Nú seti eg Ellint og Karsten á pláss

Men Páll hann fer í tí sáligu stund
og ringjur til hesar jassar
Hann bjóðar teimum til Sands á fund
Og »ja« søgdu hesir knassar
Ja hetta her hendi ein summardag
So var hesin fundurin fingin í lag

So sessast teir allir við fundarbroð
Og Páll sigur hoyri tit seru
Nú skulu tit lýða á míni orð
So treiskur vit sandingar eru
Tit sleppa ei aftur av hesari oyggj
Fyrrenn Teistin hann flytur bæði mann og moyggj

Í tríati seks tímar sótu teir har
Og har økst so orð av orði
Teir nærkast at enda har meir og meir
Og síðan fekst semja við borði
Um Skopunarfjrøð er nú prýðiligt far
Vit ynskja at harrin hann fylgir tær

Niðurlag:
Alt í Sanoynni vakurt er og gott
Kemur ikki við í henda tátt

*Loysunnardagin 5/7 2001*
**Sólvit Simonsen**



*Kenneth Nygaard á Glyvrum vann fyrstu virðisløn í búmerkjakappingini hjá Sandavágs kommunu og fekk 10.000 krónur. Aðru virðisløn vann Sólbjørn Kjærbæk í Sandavági. Hann fekk 5.000 krónur*

# Sandavágur fingið búmerki

BÚMERKJAKAPPING
*Tíðindaskriv*

Sandavágs Kommuna hevur skipað fyri búmerkjakapping og er nú greitt hvørjir vinnararnir eru.

nr. 1. Kenneth Nygaard, Glyvrar
nr. 2. Sólbjørn Kjærbæk, Sandavágur
nr. 3. Jákup E. Hansen, Sandavágur

Á samkomu 4. juli vóru virðislønirnar handaðar.

Fyrsta virðisløn er 10.000 kr, onnur virðisløn er 5.000 og triða virðisløn er 3.000 kr.

